# Eysturoyingur so skjótur sum ongantíð

## Kanón kapping á Skála-fjørðinum

**EYSTANSTEVNA** Fyrireikararnir stóðu seg til UG, og nú róðrarárið er um at vera hálvrunnið, er tað framvegis stórur spenningur í fleiri av kappingunum

Tróndur Arge

Tað gekk sum eftir ánni, tá ið triði FM kappróðurin leygardagin var á Eystanstevnu á Skálafjørðinum. Høgættarlotið var orsøk til, at tað ikki var púra deyðaslætt, og harvið kendist tað sum avbjóðing hjá óroyndu manningunum, men tað var týðuligt, at longu nú eru manningarnar meiri royndar í at leggja til startin og at rógva, enn tær hava verið fyrr í ár.

Fyrireikingarnar vóru fyrimyndarligar. Tað gekk skjótt og væl at leggja bátarnar, tað var ongantíð neyðugt við umstarti, og samlaða róðrartíðin var so stutt, sum tað bara ber til at vóna, at hon kann vera.

At lotið var undan bar møguleika við sær fyri, at met kundu verða sett. Í einum føri var talan um mettíð. Tað var í kappingini millum 6-mannafør við monnum. Páll Fangi róði skjótari, enn nakað 6-mannafar við monnum nakrantíð hevur róð á Eystanstevnu.

Tá ið talan er um tíðir og met í kappróðri, so skal alt takast við stórum fyrivarni, men í fleiri kappingum vóru tíðirnar betri, enn tær hava verið seinastu árini.

Nú bíðar Jóansøkan. Í Vági verður bara kappast á 1000 metra málinum. Tá kann tað vera, at okkurt fer at síggja øðrvísi út, enn tað higartil hevur gjørt. Í barnaróðrinum hava vinnararnir verið teir somu allar tríggjar ferðirnar. Í hinum kappingunum hevur tað í trimum kappingum verið soleiðis, at sami bátur hevur vunnið allar tríggjar ferðirnar. 6-mannaførini Sølmundur við kvinnum og Páll Fangi við monnum og 8-mannafarið Kvívíkingur hava vunnið allar tríggjar ferðirnar.

Á Eystanstevnu var ein nýggjur vinnari. Tað var í kappingini millum 5-mannaførini við gentum, har Beinta úr Miðvági var fyrst á mál. Hetta er einasta kappingin, har tað hava verið tríggir ymiskir vinnarar í teimum trimum kappingunum, sum higartil eru avgreiddar.

*trondur@sosialurin.fo*



*Glaðir eysturoyingar í heimasjógvi eftir sigurin í 10. mannafarðsróðrinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**10-MANNAFØR** Í heimasjógvi róði Eysturoyingur leygardagin 2000 metra málið skjótari, enn hann nakrantíð áður hevur gjørt á Eystanstevnu

Tróndur Arge

Tað var eingin spenningur, tá ið 10-mannaførini leygardagin róðu á Skálafjørðinum. Eysturoyingur smurdi Vestmenningin av. Á málinum var munurin meiri enn hálvonnur bátslongd.

Harvið eydnaðist tað Eysturoyingi so rudduliga at fáa sett tingini upp á pláss aftur, eftir at Vestmenningur fyri viku síðani á Sundalagsstevnu var fremstur. Fyrstu lítlu løtuna var javnt millum allar tríggjar bátarnar. So tók Hoyvíkingur at dragna, og stútt og støðugt stakk Eysturoyingur seg framum Vestmenning.

Vestmenningar gjørdu einar tvær atsóknir í royndum at bjóða gula bátinum av. Men Kappróðrarfelagið NSÍ ynskti ikki at vísa blíðskap – í hvussu so er ikki úti á fjørðinum.

Síðani tað í 1973 varð farið undir FM kappróður í tí líki, sum tað nú verður kappast, hevur Eysturoyingur tríggjar ferðir vunnið á Eystanstevnu. Fyrsti sigurin var við nýggja bátinum í 1998. Sami bátur vann aftur í 2002, og nú vunnu teir í bátinum, sum Sámal Hansen smíðaði í fjør.

Hesa ferð róðu teir við Eysturoyingi 2000 metra málið á Skálafjørðinum skjótari, enn teir nakrantíð áður hava gjørt tað. Vinnaratíðin var 9.02.11. Fínu hagtølini á drekin.fo siga, at bara eina ferð áður hevur vinnaratíðin á Eystanstevnu verið betri enn so. Tað var í 1976, tá ið Skálabáturin vann í tíðini 8.53.30. Tann tíðin var altso 0.09.03 betri enn tíðin hjá Eysturoyingi hesa ferð.

Triði besta vinnaratíðin á Eystanstevnu var tann hjá Vágbingi í 1982. Ta ferðina var vinnaratíðin hjá Vágbingi 9.03.09 ella knappliga eitt sekund lakari enn tíðin hjá Eysturoyingi hesa ferð.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 09:02.11 |
| 2 | Vestmenningur | 09:05.22 |
| 3 | Hoyvíkingur | 09:16.09 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 20 |
| 2 | Vestmenningur | 19 |
| 3 | Hoyvíkingur | 15 |